# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# FOKUS Á STAKAR UPPIHALDARAR

Í kvøld verður ein áhugaverdur fundur í Miðlahúsinum, har korini hjá støkum uppihaldarum og børnum teirra verða á breddanum. Høvi til fundin er høvuðsuppgávan tveimum lesandi, sum greitt vísir, at føroyska vælferðarsamfelagið als ikki livir upp til endamálið, tá tað snýr seg um stakar uppihaldarar.

Tað er eitt vanligt eyðkenni fyri okkum føroyingar at dylja heldur enn viðganga trupulleikar. Vit vilja heldur vilja reka samfelagsbólkar av landinum - heldur enn at skapa teimum tilsvarandi kor her heima.

Ein av hesum bólkum eru støku uppihaldarar og børn teirra. Her livir okkara samfelagsskipan als ikki upp til idéalið í vælferðarsamfelagnum. Sjálv skipanin vil ikki síggja trupulleikan og tíans heldur at gera nakað við hann.

Vit hava í kvøld stevnt øllum løgtings- og landsstýrisfólkum til fundar í Miðlahúsinum - saman við øllum øðrum áhugaðum, har fokus verður sett á hendan trupulleikan: At tað er sera dýrt at liva í Føroyum, eisini hjá vanlium húsarhaldum við tveimum inntøkum.

Tað er harmiligt at staðfesta, at okkara samfelagsskipan letur tað upp í hendurnar hjá familju og avvarðandi at halda lív í ungum barnafamiljunum, sum ikki fáa endarnar at røkka saman, hóast forsyrgjarin arbeiðir fulla tíð og meiri enn tað. Politikarar eru tríbýttir í hesum máli: Vit hava tey, sum nærmast kriminalisera stakar uppihaldarar og skíra teir at vera dovnar nassarar, sum heilt sikkurt ikki eru veruliga stakir.

So hava vit tey, sum ikki vilja bøta um livikorini og hjálpina til stakar uppihaldarar, tí tað hevði eggjað fólki at farið hvør til sítt, og tað ber jú ikki til, tí heilaga hjúnarbandið skal varðveitast.

Síðani hava vit seinasta bólkin við politikarum, sum ynskja at bøta um korini hjá støkum uppihaldarum – fyrst og fremst fyri at koma upp á støðið í Danmark, so vit ikki skulu missa hesar familjurnar útlands.

Ofta er talan um kvinnur við



børnum – ein dýrabarur samfelagsbólkur, sum vit ikki hava ráð at missa. Ofta kvinnur við miðallongum útbúgvingum og undirvísing. Starvsbólkar, sum okkum tørvar til tess at lyfta stóru og tungu uppgávurnar í vælferðarsamfelagnum. Og børn, sum vit áttu at hjúklað um sum reyðargull, tí tey eru sum kunnugt fortreytin fyri, at liviligt verður her á landi – eisini í framtíðini.

**Vit áttu at hjúklað um børnini sum reyðargull**

# Framtíðarmiðilin – ella klossut »næstan« telefon

Ein IPad kom á Sosialin í gjár, og sjáldan hava so nógv fólk og so nógvar meiningar verið savnað rundan um eitt tól, sum hendan dagin.

IPad, sum nýggjasta teldan frá Apple eitur, hevur fingið stórar yvirskriftir um allan heim. IPad líkist sera nógv telefonini IPhone, men er størri, skíggin er 9,7 tummar.

IPad hevur fingið blandaða móttøku. Nógv halda, at hon kann ov lítið til at kallast ein telda. Til dømis er bert gjørligt at hava eitt forrit tendrað samstundis, hon er torfør at skriva við tíggju fingrum á, og battarítíðin er ov stutt. Forritið Flash, ið nógvar heimasíður nýta, er heldur ikki á IPadinum.

Tey, ið viðmæla IPadin siga, at hetta er framtíðarteldan, sum tú hevur við tær í taskuni. Hon vigar bara 680 gram, men hóast tað kann ein hava eitt heilt bókasavn við sær.

Í Føroyum ber ikki til at keypa IPaddin enn, men í Danmark er hon til sølu. Prísurin er millum 5-7.000 kr. Hann er tó at síggja hjá City, sum hevur hann til sølu í næsta mánaði.



Vit rundanum borðið á Sosialinum høvdu, líka sum ummælarirnir, ógvuliga deildar meiningar. Grafikarin Jan Tórur heldur, at ein nógv heldur skal keypa sær eina IPhone enn ein IPad, eftirsum tær stórtsæð duga tað sama, og við telefonini ber til at ringja og taka myndir eisini.

Blaðstjórin Eirikur - sum í 20 ár hevur verið svorin Apple-brúkari - er djúpt imponeraður og sær stórar møguleikar í hesum fyri blaðið, sum við IPaddinum verður meira digitaliserað og verður harvið meira interaktivt soleiðis at brúkarin í framtíðini bæði kann síggja kykmyndir og hoyra ljóðbrot beinleiðis úr pdf-útgávuni av Sosialinum. Hann sær eisini fyri sær, at IPadurin verður lættari og bleytari og høgligar at hava uppi á sær í framtíðini.

inna@sosialurin.fo



**Smyril fyri suðuroyingar**

SIRIÐ STENBERG

KJAK Á SÍÐU 12



**Ótakksamt arbeiði**

PALLI DALSGAARD

KJAK Á SÍÐU 14

# Húsagangur og Dimma



hetta kvøldið, og hevið var húsa-
gangurin hjá Dimmalætting og
avgerðin hjá Sosialinum at tillaga
útgávudagarnar úr fimm niður í
tríggjar.

Tá vit í oddagreinini mánadagin nevndu húsagangin hjá Dimmalætting, so hevur blaðstjórin gjørt okkum varug við, at Dimmalætting ikki er farin á húsagang. Tað er rætt, at Dimmalætting tekniskt sæð ikki er farin á húsagang og gjøgnum skiftirættin, haldið okkum til góðar við tí. Men faktum er tað tó, at partaeigararnir hava mist allan partapeningin – og at 30 milliónir í eginpeningi eru brúktar og burtur. Støðan kann berast saman við bankarnar í 1993. Teir fóru á húsagang - men ikki tekniskt sæð. Eins og við Dimmalætting, so kom annar íleggjari og bjargaði á strikuni við nýggjum partapeningi.

eirikur@sosialurin.fo

# Allir í føroyskum undirbuksum

Í næsta mánaði fer Livar Nysted at rógva um Atlantshavið í opnum báti saman við trimum øðrum monnum. Ferðin skal ætlandi taka um 55 dagar. Tað er kalt á leiðini, teir rógva, og tí hevur Livar Nysted fingið sær føroysk undirklæði við á ferðina. Bretarnir, sum rógva saman við honum, hava roynt føroysku undirklæðini, og teir vilja allar hava hesi undirklæði við á ferðina. So út ruku Nike og hini, sum framleiða termo-undirklæði, og inn komu føroysku ullintu undirbuksirnar.

– Føroysku undirklæðini halda eisini hitanum, tá ið tey eru vát, og tí vilja teir eisini hava hesi undirklæðini, sigur Livar Nysted.

Hann hevur fingið Mariu Klein í Klaksvík at binda teimum føroysk undirklæði.

eydun@sosialurin.fo

Sosialurin Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo
Marknaðarleiðari: Jaspur Langgaard
jaspur@sosialurin.fo